| | |
|---|---|
| **Býráðsfundir**<br>30. oktober 2014 | Blað nr.: 11523 |
| | Formansins merki: |

**GERÐABÓK**

**Dato:** 30. oktober 2014 **Kl**. 18:00
**Stað**: Býráðssalurin
**Málsnr:** 207/14-222/14

**FUNDARLEIÐARI:**
Heðin Mortensen

---

**VIÐ LUTTØKU AV:**
Jógvan Arge
Helena Dam á Neystabø
Tróndur Sigurðsson
Halla Samuelsen
Bogi Andreasen
Annfinn Brekkstein
Jákup Dam
Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal
Bjørghild Djurhuus
Elin Lindenskov
Sjúrður Johan Olsen
Sigrún Amalia Mohr

**LUTTÓKU EISINI:**
Marius Müller
Jóan Petur Hentze
Eyðna Justinussen
Ingunn Eiriksdóttir

**LUTTÓKU IKKI:**

**SKRIVARI:**
Ingibjørg Berg

**PROTOKOLLFØRARI:**
Janus Isfeldt

# 207/14 Góðkenning av mánaðarroknskapinum 2014

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 19.02.2014 | 8/14 | 14/01236-1 |
| 10 Býráðsfundir | 18.09.2014 | 182/14 | 14/01236-1 |
| 11 Fíggjarnevnd | 22.10.2014 | 260/14 | 14/01236-1 |
| 12 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 207/14 | 14/01236-1 |
| 2 Býráðsfundir | 04.03.2014 | 30/14 | 14/01236-1 |
| 3 Fíggjarnevnd | 19.03.2014 | 48/14 | 14/01236-1 |
| 4 Býráðsfundir | 27.03.2014 | 52/14 | 14/01236-1 |
| 5 Fíggjarnevnd | 19.05.2014 | 111/14 | 14/01236-1 |
| 6 Býráðsfundir | 22.05.2014 | 83/14 | 14/01236-1 |
| 7 Fíggjarnevnd | 18.06.2014 | 162/14 | 14/01236-1 |
| 8 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 133/14 | 14/01236-1 |
| 9 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 220/14 | 14/01236-1 |

**Lýsing av málinum – samandráttur:**
Sambært kunngerð nr. 89 frá 15. oktober 2008 um roknskaparverk kommununnar o.t. § 10 skulu kommunur innraportera roknskapardátur hvønn mánað til Fíggjarmálaráðið.

Sambært § 9 skal kommunustýrið góðkenna tilfarið.

Roknskapurin fyri januar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. februar 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 04. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri februar 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. mars 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 27. mars 2014:** Framlagt og gókent.

Roknskapurin fyri mars og apríl 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri mai 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 18. juni 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri juni, juli og august 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 18. september 2014:** Framlagt og góðkent.

Roknskapurin fyri og september 2014 verður lagdur fram á fundinum.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Framlagt og góðkent.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Framlagt og góðkent.

# 208/14 Fíggjarætlan 2015

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 221/14 | 14/04304-1 |
| 10 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.10.2014 | 38/14 | 14/04304-1 |
| 11 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 21.10.2014 | 13/14 | 14/04304-1 |
| 12 Tekniska nevnd | 21.10.2014 | 256/14 | 14/04304-1 |
| 13 Fíggjarnevnd | 22.10.2014 | 261/14 | 14/04304-1 |
| 14 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 195/14 | 14/04304-1 |
| 15 Trivnaðarnevndin | 20.10.2014 | 46/14 | 14/04304-1 |
| 16 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 208/14 | 14/04304-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 30.09.2014 | 257/14 | 14/04304-1 |
| 3 Býráðsfundir | 30.09.2014 | 202/14 | 14/04304-1 |
| 4 Trivnaðarnevndin | 06.10.2014 | 42/14 | 14/04304-1 |
| 5 Mentamálanevndin | 08.10.2014 | 181/14 | 14/04304-1 |
| 6 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2014 | 37/14 | 14/04304-1 |
| 7 Náttúru- og umhvørvisnevndin | 08.10.2014 | 12/14 | 14/04304-1 |
| 8 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 254/14 | 14/04304-1 |
| 9 Tilbúgvingarnevndin | 06.10.2014 | 1/14 | 14/04304-1 |

## Málslýsing:

Uppskot frá stjórnini til fíggjaræltlan 2015 verður lagt fram.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Uppskot til fíggjarætlan lagt fram og samtykt at arbeiða víðari við uppskotinum.

**Ískoyti**
Fíggjarnevndin skal fyri 1. Oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið. Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili. Fíggjarætlanin skal verða endaliga samtykt í seinasta lagi 1. Desember 2014.

Arbeitt er víðari við uppskotinum at leggja fyri fíggjarnevndina. Í talvuni niðanfyri eru høvuðstølini býtt upp á greinar.

| **Uppskot til fíggjarætlan 2015** | **FÆ2014** | **FÆ2015** | **Broyting pct.** | **Broyting kr.** |
|---|---|---|---|---|
| | | | | |
| §1 Kommunal fyrisiting | 70.221 | 74.728 | 6,42% | 4.507 |
| §2 Almanna- og heilsumál | 54.427 | 56.346 | 3,53% | 1.919 |
| §3 Børn og ung | 134.669 | 137.212 | 1,89% | 2.543 |
| §4 Undirvísing | 37.534 | 37.158 | -1,00% | -376 |
| §5 Mentan og frítíð | 41.325 | 43.843 | 6,09% | 2.518 |
| §6 Teknisk mál | 109.087 | 108.876 | -0,19% | -211 |
| §7 Kommunal virkir | 54.418 | 55.517 | 2,02% | 1.099 |
| **Útreiðslur íalt** | **501.681** | **513.680** | **2,39%** | **11.999** |
| | | | | |
| **§20 Inntøkur** | **611.681** | **624.251** | **2,05%** | **12.570** |
| | | | | |
| **Úrslit áðrenn íløgur og avdráttir** | **110.000** | **110.571** | **0,52%** | **571** |

Í uppskotinum til fíggjarætlan hækka rakstrarútreiðslurnar 11,7 mió. kr. Frá 501,7 til 513,4 mió. kr. Hædd er tikin fyri at sáttmálalønirnar á arbeiðsmarknaðinum hækkað 1,9% 1. oktober. Mett er at inntøkurnar hækkað við 12,5 mió. kr. ella 2,05%.

Skattaprosentið er óbroytt 20,25%. Við hesum fyritreytum er úrslit áðrenn íløgur og avdráttir góðar 110 mió. kr.

**Tilmæli:**
Mælt verður til at fíggjarnevndi tekur støðu til uppskotið at leggja fyri býráðið.

**Fíggjarnevnd 30. september 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykkir at taka undir við fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan og at leggja uppskotið fyri býráðið. Rakstrarútreiðslur í alt eru 513,7 mió. kr. Inntøkur 624,3 mió. kr. Úrslit áðrenn íløgur og rakstur 110.6 mió. kr. Avdráttir 2015 verða umfíggjaðir og verður íløgukarmurin 110,6 mió. kr.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu til uppskotið til fíggjarætlan á einum seinni fundi.

**Býráðsfundir 30. september 2014:** Framlagt.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. oktober 2014:** Útsett.
**Trivnaðarnevndin 6. oktober 2014:** Umrøtt og útsett til næsta fund.

**Tilbúgvingarnevndin 06. oktober 2014:** Málið viðgjørt. Mælt verður fíggjarnevndini til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 8. oktober 2014:** Framlagt.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Útsett.

**Mentamálanevndin 8. oktober 2014:** Framlagt og umrøtt.

**Ískoyti:**
Byggi- og býarskipanarnevndin skal viðgera hesar kontur:

| | | **Netto** | | |
|---|---|---|---|---|
| | | **2014** | **2015** | **Broyting** |
| 6109 | Umsiting og røkt av bygningum | 10.171 | 10.245 | 74 |
| 6110 | Umsiting og røkt av bygningum, egið rakstrarstað | 27.949 | 27.091 | -858 |
| 6210 | Fríðkan og viðlíkahald | 9.648 | 9.724 | 76 |
| 6211 | Aðrar útreiðslur (gamla Havnin) | 300 | 300 | 0 |
| 6510 | Kirkjugarðar | 2.798 | 2.828 | 30 |

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. oktober 2014:** Framlagt og viðgjørt. Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Helena D. á Neystabø, Halla Samuelsen og Annfinn Brekkstein, mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

Ein minniluti, Jógvan Arge, mælir til at hækka játtanina til umsiting og røkt av bygningum.

**Trivnaðarnevndin 20. oktober 2014:** Nevndin vísir til mál 14/01113 um normering av sálarfrøðingi til barnaverndartænastuna konta 2614. Fígging til royndarverkætlanina í inniverandi fíggjarári er játtað av kontu 2612 barnavernd. Av misgáum er upphæddin kr. 450.000 ikki tikin við í teknisku framskrivingini av fíggjarætlanini.

Nevndin hevur umrøtt tørv á leiguíbúðum til eldri, tað veri seg sum deplar við felagshúsi og atknýttum røktartænastum frá Heilsu- og umsorganartænastuni, ella vanligar eldraíbúðir at leiga. Nevndin mælir til at seta játtan av til neyvari fyrireikingar.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Ein meiriluti, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen og Sigrun Mohr, mælir til at taka undir við fyriliggjandi uppskoti, tó so, at nevndin hevur staðfest tørv á fígging til kontu 3212 tímar til serligan tørv, til kontu 3216 verkætlanir á ungdómsøkinum, og til frítíðartilboð til næmingar í 3. flokki.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Tekniska nevnd skal viðgera hesar kontur:

| | | Netto | | |
|---|---|---|---|---|
| | | **2014** | **2015** | **Broyting** |
| 6710 | Vatnveiting | 6.398 | 6.447 | 49 |
| 6810 | Kloakkir o.a. | 6.266 | 6.300 | 34 |
| 6811 | Áír, yvirflatuvatn og veitir | 2.971 | 2.989 | 18 |
| 8110 | Vegir o.a. | 7.329 | 7.391 | 62 |
| 8111 | Reinhald | 5.688 | 5.751 | 63 |
| 8112 | Asfalt | 10.716 | 10.791 | 75 |
| 8113 | Ferðsla | 2.439 | 2.461 | 22 |
| 8114 | Kavarudding | 2.422 | 2.437 | 15 |
| 8210 | Gøtuljós | 7.334 | 8.066 | 732 |
| 7510 | Bussleiðin | 24.030 | 24.520 | 490 |
| 7610 | Parkeringsskipanin | 0 | 0 | |

**Tekniska nevnd 21. oktober 2014:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Helena D. á Neystabø og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Ískoyti:**
Náttúru- og umhvørvisnevndin skal viðgera hesar kontur:

| | | Netto | | |
|---|---|---|---|---|
| | | **2014** | **2015** | **Broyting** |
| 6610 | Umhvørvistiltøk o.a. | 1.660 | 1.662 | 2 |
| 6611 | Aðrar útreiðslur (upptøka av leysum djórum v.m.) | 618 | 624 | 6 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| 7110 | Renovasjón | 18.497 | 18.869 | 372 |

**Náttúru- og umhvørvisnevndin 21. oktober 2014:** Ein meiriluti, Sigrún Mohr, Elin Lindenskov, Halla Samuelsen og Bjørghild Djurhuus, samtykti at taka undir við fyriliggjandi uppskoti.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, mælir til at seta játtan av til at seta løðistøðir til elbilar upp í býnum og eisini at seta játtan av til fyrireiking at knýta Lágargarð í sjóvarhitan Yviri við Strond.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, mælir býráðnum til at taka undir við fíggjarætlanini við teirri broyting, at konto 2614 hækkar 450.000 kr. ísv. normering av sálarfrøðingi til barnaverndartænastuna.

Tikið verður til erftirtektar, at nýggj inntøkumeting er gjørd, ið vísir hækkaðar inntøkur á 11,7 mió. kr. Í mun til upprunauppskotið.

Meirilutin mælir harumframt býráðnum til at taka undir við fyriliggjandi íløguætlan fyri 2015:

| | | FÆ2015 |
|---|---|---|
| **§3** | **Børn og ung** | |
| 3175 Barnaansing | Birkilund | 5.000 |
| **§3** | **Íalt** | **5.000** |
| | | |
| **§4** | **Undirvísing** | |
| 4176 Nýbygging skúlar | Vesturskúli | 10.000 |
| **§4** | **Íalt** | **10.000** |
| | | |
| **§5** | **Mentan og frítíð** | |
| 5175 Musikskúlin | Musikkskúli | 20.000 |
| 5775 Ìtróttaranlegg | Tórsvøllur | 20.500 |
| 5775 Ìtróttaranlegg | Høll í Gundadali | 7.000 |
| **§5** | **Íalt** | **47.500** |
| | | |
| **§6** | **Teknisk mál** | |
| 6175 Umsiting og røkt av fastari ogn | Keyp av bygningum | 30.000 |
| 6275 Fríðkan av kommununi | Miðbýarætlan | 5.000 |
| 6875 Kloakkir | Kloakkir | 3.000 |
| 8175 Vegir | Brúgv um Sandá | 55.000 |
| 8175 Vegir | Aðrar vegaætlanir | 5.000 |
| 8375 Rakstrargøgn | Rakstrargøgn | 3.000 |
| **§6** | **Íalt** | **101.000** |
| | | |
| **Samanlagt** | **Samanlagt** | **163.500** |

Ein minnilui, Jógvan Arge, tekur støðu á seinni fundi, men mælir býráðnum til at geva viðmerkingunum úr nevndunum gætur.

# Høvuðsyvirlit

| **Høvuðsyvirlit yvir fíggjarætlan** | | | | **2015** |
|---|---|---|---|---|
| | | Rakstrarætlan | | Løgu- |
| Túsund kr. | | Útreiðslur | Inntøkur | ætlan |
| **§ 1.** | **Kommunal fyrisiting** | **74.728** | **-** | **-** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 71.727 | - | - |
| | 18. Almenn starvsfólk v.m. | 3.001 | - | - |
| **§ 2.** | **Almanna- og heilsumál** | **56.805** | **-** | **-** |
| | 20. Heilsumál | 17.476 | - | - |
| | 21. Almannamál | 39.329 | - | - |
| **§ 3.** | **Børn og ung** | **137.212** | **-** | **5.000** |
| | 24. Mentan | 6.896 | - | - |
| | 26. Barnaansing | 130.316 | - | 5.000 |
| **§ 4.** | **Undirvísing** | **37.157** | **-** | **10.000** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 37.157 | - | 10.000 |
| **§ 5.** | **Mentan og frítíð** | **43.843** | **-** | **47.500** |
| | 23. Útbúgving og gransking | 10.599 | - | 20.000 |
| | 24. Mentan | 33.244 | - | 27.500 |
| **§ 6.** | **Teknisk mál** | **108.877** | **-** | **101.000** |
| | 11. Felagsútreiðslur | 47.202 | - | 35.000 |
| | 24. Mentan | 2.828 | - | - |
| | 30. Umhvørvi | 18.022 | - | 3.000 |
| | 38. Samferðsla og samskifti | 40.825 | - | 63.000 |
| **§ 7.** | **Kommunal virki** | **28.312** | **-** | **60.000** |
| | 30. Umhvørvi | 18.869 | - | - |
| | 31. Tilbúgving | 8.409 | - | - |
| | 37. Handil og vinna annars | 3.719 | - | - |
| | 38. Samferðsla og samskifti | -2.685 | - | 60.000 |
| **Tilsamans** | | **486.934** | **-** | **223.500** |
| § 20. | 22. Íbúðarmál | 25.000 | - | - |
| § 20. | 50. Rentur | 8.815 | 300 | - |
| § 20. | 52. Skattir og avgjøld | 2.500 | 671.966 | - |
| Tilsamans | | 523.249 | 672.266 | 223.500 |
| Yvirskot | | - | 149.017 | - |
| **Rakstrar-, løgu- og útlánsætlan RLÚ** | | **-** | **-74.483** | **-** |
| § 25. | 60. Broytingar í "virði" og "skuld v.m." | - | 32.795 | - |
| **Nettokassaúrslit** | | **-** | **-41.688** | **-41.688** |
| § 25. | 62. Afturgjald av skuld | 20.203 | - | - |
| **Bruttokassaúrslit** | | **20.203** | **-41.688** | **-61.891** |
| Fígging: | | | | |
| § 25. | 64. Útvegan av gjaldføri | - | 61.890 | - |
| Fígging íalt: | | - | 61.890 | 61.890 |
| **Samanlagt** | | **20.203** | **20.202** | **-** |

# § 1 Kommunal fyrisiting

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 74.728 | 74.728 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **71.727** | **-** |
| 1.11.11. Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir | | 3.900 | - |
| 1.11.12. Val og valnevndir | | 303 | - |
| 1.11.14. Kommunufyrisitingin | | 65.374 | - |
| 1.11.21. Kommunufeløg | | 2.150 | - |
| **Almenn starvsfólk v.m.** | | **3.001** | **-** |
| 1.18.11. Tænastumannaeftirlønir | | 3.001 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 74.728 | - |
| Nettostýrt virksemi | | 4.311 | 4.311 |
| Virksemi tilsamans | | 79.039 | 4.311 |
| Rakstrarinntøkur | | - | 4.211 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 774 | - |
| Flytingarútreiðslur | | 5.135 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 73.130 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | | - | 100 |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

### Felagsútreiðslur

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **1.11.11. Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir** | | |
| 110. Samsýningar o.a. til kommunustýrislimir (Rakstrarj.) | 3.900 | - |
| **1.11.12. Val og valnevndir** | | |
| 110. Val og valnevndir (Rakstrarj.) | 303 | - |
| **1.11.14. Kommunufyrisitingin** | | |
| 110. Kommunufyrisitingin (Rakstrarj.) | 65.374 | - |
| **1.11.21. Kommunufeløg** | | |
| 110. Kommunufeløg (Stuðulsj.) | 2.150 | - |

### Almenn starvsfólk v.m.

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **1.18.11. Tænastumannaeftirlønir** | | |
| 110. Eftirlønir (Stuðulsj.) | 3.001 | - |

# § 2 Almanna- og heilsumál

# A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | | 56.805 | 56.805 | - |
| **Heilsumál** | | | **17.476** | **-** |
| 2.20.21. | Ymiskar heilsuútreiðslur | | 1.665 | - |
| 2.20.22. | Kommunulækna- og heilsutænastur | | 4.521 | - |
| 2.20.23. | Tannrøkt | | 11.290 | - |
| **Almannamál** | | | **39.329** | **-** |
| 2.21.12. | Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál | | 300 | - |
| 2.21.13. | Ymiskar almannaútreiðslur | | 1.169 | - |
| 2.21.31. | Barnavernd | | 27.076 | - |
| 2.21.61. | Eldrarøkt | | 2.313 | - |
| 2.21.62. | Tilboð og tiltøk til eldri | | 3.501 | - |
| 2.21.72. | Forsorg | | 4.970 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 56.805 | - |
| Nettostýrt virksemi | 2.628 | 2.628 |
| Virksemi tilsamans | 59.433 | 2.628 |
| Rakstrarinntøkur | - | 1.394 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 6.264 | 1.234 |
| Flytingarútreiðslur | 6.795 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 46.374 | - |

# B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

## Heilsumál

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **2.20.21. Ymiskar heilsuútreiðslur** | | |
| 110. Ymiskar heilsuútreiðslur (Rakstrarj.) | 1.665 | - |
| **2.20.22. Kommunulækna- og heilsutænastur** | | |
| 110. Kommunulækna- og heilsutænastur (Rakstrarj.) | 4.521 | - |
| **2.20.23. Tannrøkt** | | |
| 110. Tannrøkt (Rakstrarj.) | 11.290 | - |

## Almannamál

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **2.21.12. Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál** | | |
| 110. Stuðul til endamál innan almanna- og heilsumál (Stuðulsj.) | 300 | - |
| **2.21.13. Ymiskar almannaútreiðslur** | | |
| 110. Ymiskar almannaútreiðslur (Rakstrarj.) | 1.169 | - |
| **2.21.31. Barnavernd** | | |
| 110. Barnavernd (Rakstrarj.) | 27.076 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **2.21.61.** | **Eldrarøkt** | | |
| 110. | Eldrarøkt (Rakstrarj.) | 2.313 | - |
| **2.21.62.** | **Tilboð og tiltøk til eldri** | | |
| 110. | Tilboð og tiltøk til eldri (Rakstrarj.) | 3.501 | - |
| **2.21.72.** | **Forsorg** | | |
| 110. | Forsorg (Stuðulsj.) | 4.970 | - |

# § 3 Børn og ung

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 137.212 | 137.212 | - |
| Løguætlan | 5.000 | 5.000 | - |
| **Mentan** | | **6.896** | **-** |
| 3.24.12. Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm | | 6.896 | - |
| **Barnaansing** | | **135.316** | **-** |
| 3.26.11. Barnaansing | | 135.316 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 142.212 | - |
| Nettostýrt virksemi | | 35.338 | 35.338 |
| Virksemi tilsamans | | 177.550 | 35.338 |
| Rakstrarinntøkur | | - | 35.338 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 9.282 | - |
| Flytingarútreiðslur | | 12.126 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 151.142 | - |
| Løguútreiðslur | | 5.000 | - |

## B. Játtanir

| | | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| | | - Tús. kr. - | |

### Mentan

| | | | |
|---|---|---|---|
| **3.24.12.** | **Tilboð og tiltøk til børn og ungdóm** | | |
| 110. | Tilboð og tiltøk til børn og ung (Rakstrarj.) | 6.896 | - |

### Barnaansing

| | | | |
|---|---|---|---|
| **3.26.11.** | **Barnaansing** | | |
| 112. | Aðrar útreiðslur í samband við barnaansing (Rakstrarj.) | 16.654 | - |
| 110. | Barnaansing (Rakstrarj.) | 113.662 | - |

| | | |
|---|---|---|
| 111. Barnaansing (Løguj.) | 5.000 | - |

# § 4 Undirvísing

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 37.157 | 37.157 | - |
| Løguætlan | 10.000 | 10.000 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **47.157** | **-** |
| 4.23.22. Fólkaskúlin | | 46.232 | - |
| 4.23.31. Endurgjald til lærlingaútreiðslur | | 925 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 47.157 | - |
| Nettostýrt virksemi | | 537 | 537 |
| Virksemi tilsamans | | 47.694 | 537 |
| Rakstrarinntøkur | | - | 537 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 3.936 | - |
| Flytingarútreiðslur | | 534 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 33.224 | - |
| Løguútreiðslur | | 10.000 | - |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

### Útbúgving og gransking

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **4.23.22. Fólkaskúlin** | | |
| 110. Fólkaskúlin (Rakstrarj.) | 34.750 | - |
| 112. Verkætlanir og aðrar útreiðslur á fólkaskúlaøkinum (Rakstrarj.) | 1.482 | - |
| 111. Fólkaskúlin (Løguj.) | 10.000 | - |
| **4.23.31. Endurgjald til lærlingaútreiðslur** | | |
| 110. Endurgjald til lærlingaútreiðslur (Stuðulsj.) | 925 | - |

# § 5 Mentan og frítíð

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 43.843 | 43.843 | - |
| Løguætlan | 47.500 | 47.500 | - |
| **Útbúgving og gransking** | | **30.599** | **-** |
| 5.23.51. Musikkskúlin | | 26.656 | - |
| 5.23.52. Kvøld- og listaskúlar | | 3.943 | - |
| **Mentan** | | **60.744** | **-** |
| 5.24.13. Tilboð og tiltøk innan mentan og frítið | | 3.751 | - |
| 5.24.14. Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál | | 7.510 | - |
| 5.24.31. Bókasavn | | 6.204 | - |
| 5.24.32. Søvn og mentanararvur | | 755 | - |
| 5.24.61. Svimjihøllin | | 6.709 | - |
| 5.24.62. Ítróttaranlegg | | 35.815 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 91.343 | - |
| Nettostýrt virksemi | | 12.086 | 12.086 |
| Virksemi tilsamans | | 103.429 | 12.086 |
| Rakstrarinntøkur | | - | 8.356 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 5.308 | 3.590 |
| Flytingarútreiðslur | | 7.508 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 43.113 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | | - | 140 |
| Løguútreiðslur | | 47.500 | - |

# B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

## Útbúgving og gransking

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **5.23.51. Musikkskúlin** | | |
| 111. Musikkskúlin (Løguj.) | 20.000 | - |
| 110. Musikkskúlin (Rakstrarj.) | 6.656 | - |
| **5.23.52. Kvøld- og listaskúlar** | | |
| 110. Kvøld- og listaskúlar (Rakstrarj.) | 3.943 | - |

## Mentan

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **5.24.13. Tilboð og tiltøk innan mentan og frítið** | | |
| 110. Tilboð og tiltøk innan mentan og frítíð (Rakstrarj.) | 3.751 | - |
| **5.24.14. Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál** | | |
| 110. Stuðul til ítróttar- og mentanarendamál (Stuðulsj.) | 7.010 | - |
| 111. Stuðul til íløgur (Stuðulsj.) | 500 | - |
| **5.24.31. Bókasavn** | | |
| 110. Bókasavn (Rakstrarj.) | 6.204 | - |
| **5.24.32. Søvn og mentanararvur** | | |
| 110. Søvn og mentanararvur (Rakstrarj.) | 755 | - |
| **5.24.61. Svimjihøllin** | | |

| | | |
|---|---|---|
| 110. Svimjihøllin (Rakstrarj.) | 6.709 | - |
| **5.24.62. Ítróttaranlegg** | | |
| 110. Ítróttaranlegg (Rakstrarj.) | 8.315 | - |
| 111. Ítróttaranlegg (Løguj.) | 27.500 | - |

# § 6 Teknisk mál

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 108.877 | 108.877 | - |
| Løguætlan | 101.000 | 101.000 | - |
| **Felagsútreiðslur** | | **82.202** | **-** |
| 6.11.31. Umsiting og røkt av fastognum | | 67.178 | - |
| 6.11.32. Fríðkan av kommununi | | 15.024 | - |
| **Mentan** | | **2.828** | **-** |
| 6.24.51. | | 2.828 | - |
| **Umhvørvi** | | **21.022** | **-** |
| 6.30.11. Umhvørvistiltøk v.m. | | 2.286 | - |
| 6.30.21. Vatnveiting | | 6.447 | - |
| 6.30.41. Kloakkir | | 12.289 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **103.825** | **-** |
| 6.38.11. Vegir | | 88.831 | - |
| 6.38.12. Gøtuljós | | 8.066 | - |
| 6.38.13. Rakstrargøgn | | 6.928 | - |
| *Yvirlit yvir høvuðssløg:* | | | |
| Játtan tilsamans | | 209.877 | - |
| Nettostýrt virksemi | | 17.556 | 17.556 |
| Virksemi tilsamans | | 227.433 | 17.556 |
| Rakstrarinntøkur | | - | 17.556 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | | 4.498 | - |
| Flytingarútreiðslur | | 580 | - |
| Rakstrarútreiðslur | | 121.355 | - |
| Løguútreiðslur | | 101.000 | - |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

### Felagsútreiðslur

| | | |
|---|---|---|
| **6.11.31. Umsiting og røkt av fastognum** | | |
| 111. Umsiting og røkt av fastognum (Løguj.) | 30.000 | - |
| 110. Umsiting og røkt av fastognum (Rakstrarj.) | 37.178 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.11.32.** | **Fríðkan av kommununi** | | |
| 111. | Fríðkan av kommununi (Løguj.) | 5.000 | - |
| 110. | Fríðkan av kommununi (Rakstrarj.) | 10.024 | - |

## Mentan

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.24.51.** | | | |
| 110. | Kirkjugarðar (Rakstrarj.) | 2.828 | - |

## Umhvørvi

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.30.11.** | **Umhvørvistiltøk v.m.** | | |
| 110. | Umhvørvistiltøk v.m. (Rakstrarj.) | 2.286 | - |
| **6.30.21.** | **Vatnveiting** | | |
| 110. | Vatnveiting (Rakstrarj.) | 6.447 | - |
| **6.30.41.** | **Kloakkir** | | |
| 111. | Kloakkir (Løguj.) | 3.000 | - |
| 110. | Kloakkir (Rakstrarj.) | 9.289 | - |

## Samferðsla og samskifti

| | | | |
|---|---|---|---|
| **6.38.11.** | **Vegir** | | |
| 111. | Vegir (Løguj.) | 60.000 | - |
| 110. | Vegir (Rakstrarj.) | 28.831 | - |
| **6.38.12.** | **Gøtuljós** | | |
| 110. | Gøtuljós (Rakstrarj.) | 8.066 | - |
| **6.38.13.** | **Rakstrargøgn** | | |
| 111. | Rakstrargøgn (Løguj.) | 3.000 | - |
| 110. | Rakstrargøgn (Rakstrarj.) | 3.928 | - |

# § 7 Kommunal virki

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | 28.312 | 28.312 | - |
| Løguætlan | 60.000 | 60.000 | - |
| **Umhvørvi** | | **18.869** | **-** |
| 7.30.42. Renovasjón | | 18.869 | - |
| **Tilbúgving** | | **8.409** | **-** |
| 7.31.11. Sløkkiliðið | | 8.409 | - |
| **Handil og vinna annars** | | **3.719** | **-** |
| 7.37.51. Vinnumenning | | 3.719 | - |
| **Samferðsla og samskifti** | | **57.315** | **-** |
| 7.38.14. Havnir og lendingar | | 32.795 | - |

| | | | |
|---|---|---|---|
| 7.38.21. | Bussleiðin | 24.520 | - |
| 7.38.22. | Parkeringsskipanin | 0 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 88.312 | - |
| Nettostýrt virksemi | 83.723 | 83.723 |
| Virksemi tilsamans | 172.035 | 83.723 |
| Rakstrarinntøkur | - | 81.336 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 2.812 | - |
| Flytingarútreiðslur | 6.300 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 102.923 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 2.387 |
| Løguútreiðslur | 60.000 | - |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

### Umhvørvi

| | | |
|---|---|---|
| **7.30.42. Renovasjón** | | |
| 110. Renovasjón (Rakstrarj.) | 18.869 | - |

### Tilbúgving

| | | |
|---|---|---|
| **7.31.11. Sløkkiliðið** | | |
| 110. Sløkkiliðið (Rakstrarj.) | 8.409 | - |

### Handil og vinna annars

| | | |
|---|---|---|
| **7.37.51. Vinnumenning** | | |
| 110. Vinnumenning (Rakstrarj.) | 3.719 | - |

### Samferðsla og samskifti

| | | |
|---|---|---|
| **7.38.14. Havnir og lendingar** | | |
| 110. Havnir og lendingar (Rakstrarj.) | -27.205 | - |
| 111. Havnir og lendingar (Løguj.) | 60.000 | - |
| **7.38.21. Bussleiðin** | | |
| 110. Bussleiðin (Rakstrarj.) | 24.520 | - |
| **7.38.22. Parkeringsskipanin** | | |
| 110. Parkeringsskipanin (Rakstrarj.) | 0 | - |

# § 20 Inntøkur

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -635.951 | 36.315 | 672.266 |
| **Íbúðarmál** | | **25.000** | **-** |
| 20.22.41. Stuðul til rentuútreiðslur | | 25.000 | - |
| **Rentur** | | **8.815** | **300** |
| 20.50.11. Rentuútreiðslur | | 8.815 | - |
| 20.50.21. Rentuinntøkur | | - | 300 |
| **Skattir og avgjøld** | | **2.500** | **671.966** |
| 20.52.11. Kommunuskattur | | - | 643.966 |
| 20.52.12. Felagsskattur | | - | 18.000 |
| 20.52.13. Skattur av eftirløn | | - | 10.000 |
| 20.52.39. Aðrar inntøkur | | 2.500 | - |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 36.315 | 672.266 |
| Nettostýrt virksemi | - | - |
| Virksemi tilsamans | 36.315 | 672.266 |
| Flytingar millum almennar myndugleikar | 25.000 | - |
| Flytingarútreiðslur | 8.815 | - |
| Rakstrarútreiðslur | 2.500 | - |
| Skattir og flytingarinntøkur | - | 672.266 |

# B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

## Íbúðarmál

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **20.22.41. Stuðul til rentuútreiðslur** | | |
| 110. Stuðul til rentuútreiðslur (Stuðulsj.) | 25.000 | - |

## Rentur

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **20.50.11. Rentuútreiðslur** | | |
| 110. Rentuútreiðslur (Ógreinað j.) | 8.815 | - |
| **20.50.21. Rentuinntøkur** | | |
| 110. Rentuinntøkur (Ógreinað j.) | - | 300 |

## Skattir og avgjøld

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| **20.52.11. Kommunuskattur** | | |
| 110. Kommunuskattur (Ógreinað j.) | - | 643.966 |
| **20.52.12. Felagsskattur** | | |
| 110. Felagsskattur (Ógreinað j.) | - | 18.000 |
| **20.52.13. Skattur av eftirløn** | | |
| 110. Skattur av eftirløn (Ógreinað j.) | - | 10.000 |
| **20.52.39. Aðrar inntøkur** | | |

| | | |
|---|---|---|
| 110. Aðrar inntøkur (Ógreinað j.) | 2.500 | - |

# § 25 Gjaldføri

## A. Yvirlit

*Játtanaryvirlit*

| Tús. kr | Netto | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|---|
| Útreiðsluætlan | -74.482 | 20.203 | 94.685 |
| **Broytingar í "virði" og "skuld v.m."** | | **-** | **32.795** |
| 25.60.11. Broytingar í virði og skuld v.m. | | - | 32.795 |
| **Afturgjald av skuld** | | **20.203** | **-** |
| 25.62.11. Afturgjald av skuld | | 20.203 | - |
| **Útvegan av gjaldføri** | | **-** | **61.890** |
| 25.64.11. Útvegan av gjaldføri | | - | 61.890 |

*Yvirlit yvir høvuðssløg:*

| | | |
|---|---|---|
| Játtan tilsamans | 20.203 | 94.685 |
| Nettostýrt virksemi | - | - |
| Virksemi tilsamans | 20.203 | 94.685 |
| Fíggjarpostar | 20.203 | 61.890 |
| Broytingar í "VIRÐI" og "SKULD V.M." | - | 32.795 |

## B. Játtanir

| | Útreiðslur | Inntøkur |
|---|---|---|
| | - Tús. kr. - | |

### Broytingar í "virði" og "skuld

| | | |
|---|---|---|
| **25.60.11. Broytingar í virði og skuld v.m.** | | |
| 110. Broytingar í virði og skuld v.m. (Ógreinað j.) | - | 32.795 |

### Afturgjald av skuld

| | | |
|---|---|---|
| **25.62.11. Afturgjald av skuld** | | |
| 110. Afturgjald av skuld (Ógreinað j.) | 20.203 | - |

### Útvegan av gjaldføri

| | | |
|---|---|---|
| **25.64.11. Útvegan av gjaldføri** | | |
| 110. Útvegan av gjaldføri (Ógreinað j.) | - | 61.890 |

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti við fyrstu viðgerð.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu
Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

# 209/14 Fíggjarætlan fyri 2015 hjá Tórshavnar havn.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 11.08.2014 | 31/14 | 14/03981-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 30.09.2014 | 258/14 | 14/03981-1 |
| 3 Býráðsfundir | 30.09.2014 | 203/14 | 14/03981-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 237/14 | 14/03981-1 |
| 5 Vinnunevndin | 06.10.2014 | 40/14 | 14/03981-1 |
| 6 Fíggjarnevnd | 22.10.2014 | 262/14 | 14/03981-1 |
| 7 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 209/14 | 14/03981-1 |

**Málslýsing:**
Sambært kommunustýrisskipanini skal fíggjarnevndin fyri 1. oktober leggja uppskot til fíggjarætlan fyri kommunustýrið til komandi fíggjarætlan.

Kommunustýrið skal viðgera uppskot til fíggjarætlan tvær ferðir við í minsta lagi 14 daga millumbili.

Fíggjarætlanin skal vera endaliga samtykt í seinasta lagi 1 .desember.

**Vinnunevndin 11. august 2014:** Nevndin samtykti at góðkenna fíggjarætlanina fyri 2015 og at beina málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 30. september 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein, samtykkja at taka undir við vinnunevndini og at beina málið í býráðið.

Ein minniluti, Jógvan Arge, tekur støðu á einum seinni fundi.

**Býráðsfundir 30. september 2014:** Framlagt.

**Vinnunevndin 06. oktober 2014:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum umvegis fíggjarnevndina at góðkenna fyriliggjandi uppskoti til fíggjarætlan.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við uppskotinum til fíggjarætlan.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Einmælt góðkend.

# 210/14 Vinnuøki á Skarðshjalla

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 14.04.2014 | 15/14 | 14/01388-12 |
| 2 Fíggjarnevnd | 01.05.2014 | 100/14 | 14/01388-12 |
| 3 Tekniska nevnd | 09.09.2014 | 229/14 | 14/01388-12 |
| 4 Fíggjarnevnd | 10.09.2014 | 248/14 | 14/01388-12 |
| 5 Býráðsfundir | 18.09.2014 | 190/14 | 14/01388-12 |
| 6 Tekniska nevnd | 08.10.2014 | 242/14 | 14/01388-12 |
| 7 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.10.2014 | 41/14 | 14/01388-12 |
| 8 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 210/14 | 14/01388-12 |

**Málslýsing:**

Umsitingin greiddi frá um málið viðv. eftirspurningi og kostnaði av liðugtgerð.

**Vinnunevndin 4. februar 2013:** Samtykt at umsitingin kannar kostnaðarmetingina og áhugan hjá møguligum keyparum at leggja fyri nevndina aftur.

**Ískoyti:**
Á umsøkjara listanum til vinnugrundøkir í Tórshavnar kommunu, standa í løtuni einans 8. umsøkjarar í umhvørvisflokki 3–4 og 5, og sum eisini hava goldið depositum kr. 25.000,00.

Løgdeildin hevur spurt hesar umsøkjarar um teirra áhuga í møguligum keypi av grundstykkjum, sum eru til víddar millum 790 $m^2$ og 2.000 $m^2$ á Skarðshjalla, um stykkini verða seld fyri ein prís sum verður áleið kr. 800 pr. $m^2$

Allir nevndu umsøkjarar hava fingið teldubræv, og hevur løgdeildin hoyrt aftur frá 6 av umsøkjarunum.

Tveir av umsøkjarunum eru áhugaðir, harav tann eini bert er áhugaður um hann kann fáa eitt stykkið sum er til víddar uml. 500 $m^{2.}$

Tveir av umsøkjarunum hava boðað frá, at teir ikki eru ikki áhugaðir, og skulu tveir umsøkjarar hugsa um tað og venda aftur.

Niðurstøðan er at talan er um lítlan áhuga millum verandi umsøkjarar.

Kommunan eigur tó at kanna møguleikan fyri at fremja útstykkingina, og at selja stykkini til marknaðarprís, við einum ásettum minstaprísi.

**Vinnunevndin 15. apríl 2013:** Kunnað varð um málið.

**Fíggjarnevndin 17. apríl 2013:** Samtykt at bjóða arbeiðið út í innbodnari lisitatión og at leggja fyri aftur til politiska støðutakan.

**Vinnunevndin 21. mai 2013:** Nevndin samtykti at mæla býráðnum til at gera atkomuna lidna.

**Ískoyti:**
Kommunstjórin og leiðarin á løgdeildini mæla til at bjóða arbeiðið út og játta neyðugu upphæddina til arbeiðið av konto 6975, ið verður fíggjað av konto 6175, umsiting og røkt av fastari ogn. L61021, søla av jørð. Arbeiðið er mett at kosta kr. 4.730.000,00.

**Fíggjarnevndin 29. mai 2013:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Tróndur Sigurðsson luttók ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðið 30. mai 2013:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. juni 2013:** Einmælt samtykt við aðru viðgerð.

Helena Dam á Neystabø luttók ikki í viðgerðini av máli 2013-0315

**Ískoyti:**
Útstykkingarprosjekt er tókt til útboð (sí j. nr. 14/01392-31 til j. nr. 14/01392-35).
Eftir er at fáa formliga avtalu í lag við við leiðingsánarar, so sum Fjarhitagfelagið, SEV og FT-Net, um teirra luttøku i útstykkingarprosjektinum.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til, at gera formliga avtalu við leiðingsánarar um luttøku í útstykkingarprosjektinum og at arbeiðið verður boðið út í inbodnari lisitatión.

**Vinnunevndin 14. apríl 2014:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum og beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 1. maj 2014:** Samtykt at taka undir við vinnunevndini.

**Ískoyti:**
Komið er eftir, at umsitingarlig misskiljing er orsøk til, at kostnaðarmetingin, sum í málslýsingini til fíggjarnevndina tann 29. mai 2013 og eftirfylgjandi nevndarfundir, ikki er grundað á at alt útstykkingarabeiðið verður gjørt, sum málslýsingin til nevndirnar annars gevur fatan av, men bert helvtin av hesum (sí j.nr. 14/01392-45).

Umsitingin hevur samsvarandi Vinnunevndarsamtykt tann 14. apríl 2014 og eftirfylgjandi fíggjarnevndarsamtykt tann 1. mai 2014, boðið alt útstykkingararbeiðið út (sí j. nr. 14/01388-16), í inbodnari lisitatión (sí j. nr. 14/01388-14).

Inn komu fylgjandi tilboð og eru tilboðsupphæddirnar, eftir at hesar eru eftirroknaðar av ráðgeva kommununar:

| | |
|---|---|
| Plan Sp/f | Kr. 6.706.759,50 |
| Maskingrevstur Sp/f | Kr. 7.768.811,00 |
| Maskinkoyring P/f | Kr. 8.914.470,00 |
| Við Sjógv Sp/f | Kr. 9.133.837,20 |
| Tórhall Hansen P/f | Kr. 9.371.033,70 |

Umsitingin hevur latið gera samlaða kostnaðarmeting, grundað á tilboðið frá Plan Sp/f, har prosjektering, byggileiðsla, fakeftilit, fyrisiting, óvæntað og MVG er íroknað.

Við grundarlag í tilboðnum frá Sp/f Plan, metir umsitingin at útstykkingararbeiðið kann gerast fyri kr. 7.692.854,-, tá allar útreiðslur eru íroknaðar (sí j. nr. 14/01388-17).

Býráðið hevur áður játtað kr. 4.730.000,- til verkætlanina og íresta sostatt kr. 2.962.854,- fyri at farast kann undir útstykkingararbeiðið.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at:

1. taka av lægsta tilboðnum frá Plan Sp/f áljóðandi kr. 6.706.759,50.
2. játta kr. 2.962.854,- soleiðis, at samlaða játtanin verður kr. 7.692.854,- sambært skjali j. nr. 14/01388-17.
3. beina málið viðv. fígging, um fíggjarnevndina, í býráðið.

**Tekniska nevnd 9. september 2014:** Útsett.

**Fíggjarnevnd 10. september 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at fíggja írestandi upphæddina soleiðis:

L73001 HIT húsið 642.000 kr.
L00002 Framfluttur løgukarmur kirkjugarðar 1.267.000 kr.
L00001 Fríðkan av kommununi 1.091.000 kr.
ið er treytað av, at tekniska nevnd góðkennir vegaføringina.

Málið beint í býráðið.

**Býráðsfundir 18. september 2014:** Einmælt samtykt og beint í teknisku nevnd við atliti til góðkenning av vegaføringini.

**Ískoyti:**
Tekniska prosjektið, sum er sett í útboð, er lýst á yvirlitsplani/støðumynd (sí j. nr. 14/01388-16) og við útboðstilfari, sum er frágreiðingar, arbeiðslýsingar og tekningar (sí j. nr. 14/01392-41).

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og býarverkfrøðingurin mæla til at góðkenna tekniska prosjektið og beina málið í byggi- og býrskipanarnevndina.

**Tekniska nevnd 8. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við teknisku nevnd.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Einmælt samtykt.

# 211/14 Ólóglig bygging av rampu og uttandura trappum aftanfyri bygningi hjá Javnaðarflokkinum matr. nr. 388a. Teldupostur sent til teknisku nevnd, borgarstjóran og kommunustjóran

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2014 | 22/14 | 14/03910-5 |
| 2 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 211/14 | 14/03910-5 |

## Málslýsing:

Umsókn um byggiloyvi til innrættan av loftshæddini til skrivstovuhølir á matr. nr. 388a, Niels Finsens gøta 14 hjá Javnaðarflokkinum, umframt svala omaná áarlokið

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Mayfinn Norðoy, arkitektur, søkir vegna Javnaðarflokkin um loyvi at innrætta loftshæddina á omanfyri nevndu ogn til skrivstovuhølir. Søkt verður um at innrætta loftshæddina til 3 skrivstovur, køk og fundarrúm til 50-60 fólk.
Søkt verður eisini um loyvi at gera svala frá Bøkjarabrekku omaná áarlokinum, sum er ogn hjá Tórshavnar kommunu.

**Lógir, ásetingar o.a.:**
Økið liggur í 1. grundumráði í almennu byggisamtyktini fyri Tórshavnar kommunu.

**Upplýsingar frá umsitingini:**
Bygningurin er í trimum hæddum. Kjallarahæddin verður partvís nýtt sum handilshølir, miðhæddin hevur verið nýtt sum handilshølir, meðan loftshæddin hevur verið nýtt til bústað.
Søkt verður ikki um at víðka bygningin.
Bygningurin skal hava lyftu samb. kunngerð nr. 13 frá 10. februar 2012 um atkomuviðurskifti, men umsøkjarin søkir ikki um hetta. Umsøkjarin hevur fingið at vita, at neyðugt er at søkja Innlendismálaráðið um frávik, um ætlanin er at sleppa undan at uppseta eina lyftu.
Ein møgulig svalagongd omaná áarlokinum kann gera tað trupult at fáa atkomu til grannaognina, matr. nr. 413a.

**Umhvørvisárin:**
Er viðgjørt eftir umhvørvisstigi 1.

**Fíggjarligt:**
Onga fíggjarliga binding fyri kommununa.
**Viðmerkingar frá øðrum deildum:**

Si viðmerkingar frá tekniska stjóranum, býarverkfrøðinginum, og leiðaranum á Lendisdeildini j. nr. 2012-1195/4 og 2012-1195/5.

**Viðmerkingar frá øðrum myndugleikum:**
Ongar viðmerkingar.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin fyri byggideildina mæla til at ganga umsóknini um innrættan av loftshæddini á møti, treytað av at lyft verður sett í húsið, sambært kunngerð nr. 13 frá 10. februar 2012

um atkomuviðurskifti, ella at landsstýrismaðurin (Innlendismálaráðið) loyvir undantaki, sambært kunngerðini kap. 1 stk. 2.
Eisini verður mælt til, at spurningurin um svalagongd omaná áarlokinum verður kannað nærri við atliti til styrkina á áarlokinum, og atkomu til grannaognina, matr. nr. 413a.

**Tekniska nevnd 15. mai 2013:** Nevndin samtykti at taka undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Kontrast arkitektar søkja um byggiloyvi til svala og trappu til ovastu hædd á bygninginum á matr. nr. 388a.

Svalin og trappan verða omaná áarlokinum, sum er kommunal ogn, eins og atkoman til grannaognina, matr. nr. 413a, verður skerd, soleiðis at uml. 3 m breið atkoma verður inn á ognina. Eigarin av hesi ogn hevur eisini mótmælt byggingini.

Løgdeildin er biðin um at gera eina avtalu, sum eigarin av matr. nr. 388a (Javnaðarflokkurin) skal undirskriva, áðrenn loyvi verið givið til svala og trappu. Avtalan sigur, at kommunan kann til eina og hvørja tíð krevja, at svalin og trappan verða tikin niður, uttan kostnað fyri kommununa.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at ganga umsóknini á møti, treytað av at umsøkjarin vil undirskriva avtaluna, har hann bindur seg til at taka svala og trappu niður aftur uttan útreiðslur fyri kommununa:

1) Tá eigarin av matr. nr. 413a (grannin) krevur tað, vegna atkomu til sítt stykki í sambandi við at hann skal byggja á stykkinum ella á annan hátt má fáa nøktandi atkomu til stykkið.
2) Tá kommunan krevur tað, fyri at kunna nýta økið til annað endamál ella fyri at sleppa til áarlokið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. oktober 2014:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Annfinn Brekkstein, Helena D. á Neystabø og Halla Samuelsen, samtykti at taka undir við tilmælinum.

Ein minniluti, Jákup Dam, tekur ikki undir við tilmælinum.

**Ískoyti:**
Býráðslimur biður um málið á skrá.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Marin Katrina Frýdal setti uppskot fram um, at Heðin Mortensen borgarstjóri, sum er næstformaður í javnaðarflokkinum, er ógegnugur í málinum, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Síðan varð atkvøtt um uppskot frá Marin Katrinu Frýdal, um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina vegna væntandi hoyring og at ein almenn gonguleið er tikin burtur, ið fall við 3 atkvøðum fyri og 10 ímóti.

Fyri atkvøddu: Jákup Dam, Marin Katrina Frýdal og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

At enda varð atkvøtt um uppskot frá Heðin Mortensen, um at beina málið í byggi- og býarskipanarnevndina, ið varð einmælt samtykt.

## 212/14 Broyting av almennu byggisamtyktini í sambandi við víðkan av Skansabryggjuni og Eystara havnaøki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2014 | 27/14 | 14/04429-1 |
| 2 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 212/14 | 14/04429-1 |

Málslýsing:
Fyrireikingin, við at víðka um Skansabryggjuna og Eystara havnaøki við uml. 163.000 $m^2$ og eini atløgusíðu uppá uml. 700 m, er nú komin so væl áleiðis, at klárt er at broyta almennu byggisamtyktina sambært ætlanini. (journal nr. 14/00896).

Umhvørvisárinskanning fyri útbyggingina er send Umhvørvisstovuni til góðkenningar, modelroynd og aldusimuleringar eru gjørdar á DHI og Yvirfriðingarnevndin hevur játtað útbyggingini.

Áðrenn farið verður undir arbeiðið, er neyðugt at víðka B1-havnaøki í almennu byggisamtyktini fyri ætlaðu útbyggingina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at B1-havnaøki í almennu byggisamtyktini verður víðkað sambært kortskjali, dagfest 23.09.2014.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal

## 213/14 Broyting av almennu byggisamtyktini fyri økið sunnan fyri skúlan við Løgmannabreyt frá A3 til D2 øki

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2014 | 28/14 | 14/04430-1 |
| 2 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 213/14 | 14/04430-1 |

Málslýsing:
Nú ætlanin er at byrja arbeiðið uppá fótbóltsvøllin í Hoyvík (j. nr. 14/00714, 14/01462 og 14/03366) er neyðugt at broyta almennu byggisamtyktina, soleiðis at økið, har vøllurin skal byggjast, verður broytt frá A3-øki til D2-øki. Ein partur av D2 økinum kemur inn á serstøku byggisamtyktina fyri Karlamagnusarbreyt, tí er eisini neyðugt at regulera serstøku byggisamtyktini eftir hesum.

Avgjørt er eisini at endurskoða serstøku byggisamtyktina fyri Karlamagnusarbreyt, tá verða reguleringarnar í sambandi við fótbóltsvøllin tiknar við. Hetta arbeiði er í gongd og verður ætlandi klárt at leggja fyri byggi- og býarskipanarnevndina á fundinum 31. oktober 2014.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at almenna byggisamtyktin verður broytt, soleiðis at eitt øki uppá uml. 14.000 $m^2$, sunnanvert skúlan við Løgmannabreyt, verður broytt frá A3 øki til D2 øki sambært korti, dagf. 23.09.2014.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal

## 214/14 Serstøk byggisamtykt fyri matr. nr. 804a, við Dalavegin, Tórshavn - Bústaðir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2014 | 31/14 | 14/04432-1 |
| 2 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 214/14 | 14/04432-1 |

**Málslýsing:**
Felagið Bústaðir hevur ætlanir um at byggja leiguíbúðir á matr. nr. 804a við Dalavegin í Tórshavn.

30. mai 2013 samtykti býráðið at broyta byggisamtyktina fyri ognina 804a frá A1 til A3 (2013-1063).

Ætlanin er at byggja 35 íbúðir á 50 $m^2$, 75 $m^2$, 100 $m^2$ og 125 $m^2$.

Sambært almennu byggisamtyktini kunnu útstykkingar í A3-øki bert gerast sambært serstakari byggisamtykt.

Umsitingin hevur, saman við felagnum Bústaðir, gjørt eitt uppskot til serstaka byggisamtykt til verkætlanina.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at góðkenna uppskotið til serstaka byggisamtykt fyri matr. nr. 804a við Dalavegin.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Einmælt samtykt.

# 215/14 Faroe Law vegna Sp/f KG7 : Umsókn um broyting av byggisamtykt fyri øki Kongagøta 7, matr. nr. 409d og 410a. Viðlagt tekningar.

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 03.10.2014 | 29/14 | 14/04463-2 |
| 2 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 215/14 | 14/04463-2 |

**Málslýsing**:
Umsókn frá Faroe Law vegna Sp/f KG7 um broyting av almennu byggisamtyktini, soleiðis at 1. grundumráði verður víðkað niðan til Kongagøtu 7, matr. nr. 409d.

Bygningurin við Kongagøtu 7, matr. nr. 409d, var brúktur til Tórshavnar Kvøld-, og Ungdómsskúla intil skúlin flutti í nýggj hølir við J.H. Schrøters gøtu. Kommunan seldi ognina til Sp/f KG7, sum hevur ætlanir um at umbyggja bygingingin til 4-6 íbúðir.

Sambært almennu byggisamtyktini liggur ognin í A1-øki, sum ikki heimilar íbúðarbygging. A1-øki liggur ímillum 1. og 2. grundumráði heilt oman ímóti Bøkjarabrekku. Meiningin við hesum A1-økinum er helst, at varveita ovara part av Tinghúsvegnum og Tungugøtu sum sethúsaøki.

Tað at fáa fleiri bústaðir í miðbýin, samsvarar væl við ynski hjá býráðnum at skapa lív í miðbýnum eisini eftir at skrivstovur og handlar eru lukkaði.

Fyrispurningar hava eisini verið um bygging á grannaognini matr. nr. 410a, Tórshavn, sum ikki bleiv til nakað, lutvíst orsakað av ásetingum í byggisamtyktini (j.nr. 2007-2937).

Býarskipanardeildin mælir til at broyta almennu byggisamtyktina við at víðka 1. grundumáði eystureftir, soleiðis at ognirnar matr. nr. 409d og 410a, Tórshavn, verða í 1. grundumráði.

Viðmerkjast skal, at í sambandi við søluna av ognini hava teir, sum hava víst áhuga fyri ognini, fingið at vita, at tað bert kann byggjast eftir ásetingunum fyri umráðispartin A1 í almennu byggisamtyktini, tvs. í mesta lagi 2 íbúðir.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til at broyta almennu byggisamtyktina fyri ognirnar matr. nr. 409d og 410a, Tórshavn, frá A1-øki til 1. grundumráði sambært kortskjali, dagfest 23.09.2014.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 3. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býráðið.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Einmælt samtykt.

# 216/14 P/F Articon um leigu av øki á havnarøkinum á Sundi til goymslu av sandi, skeriv og sementi

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Vinnunevndin | 06.10.2014 | 38/14 | 14/04598-2 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.10.2014 | 271/14 | 14/04598-2 |
| 3 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 216/14 | 14/04598-2 |

**Málslýsing:**
Økið á Sundi er deilt upp í tvey. Økið niðan fyri vegin, tað sum liggur oman móti bryggjuni, og økið oman fyri vegin, har sum asfaltverkið liggur.

Tá havnalagið á Sundi bleiv tikið í brúk, bleiv tað í byggisamtyktini ásett, at alt økið skuldi brúkast til *vinnu, ið beinleiðis ella óbeinleiðis eru útflutningsfremjandi og til virksemi, ið hava samband við hesar vinnur.*

Seinni er byggisamtyktin broytt, soleiðis at økið oman fyri vegin hevur tað somu ásetingina sum frá byrjan, meðan økið niðan fyri vegin hevur fingið eina aðra áseting, sum ljóðar soleiðis:

*Umráðisparturin verður sum heild lagdur til endamál, ið hava beinleiðis við havnarakstur at gera, fyrst og fremst skrivstovur og goymslur í samband við skipaferðslu og vøruflutning og tílíkt og til virksemi, ið hava samband við hesi t.e. tænastuvirksemi og bilstøðlar o.t.*

Líka síðani byrjan hevur sjálv bryggjan verið brúkt til bulkvørur, t.e. sandur, skervur og skrott umframt at onnur skip sum hava umlastað, hava brúkt bryggjuna.

P/F Articon hevur síðani 2010 leigað 4.000 $m^2$ av økinum á Sundi til bulkvørur. Hetta er ein 8 ára leigusáttmáli.

Í skrivi frá P/F Articon, dagfest 26. september søkir felagið um at víðka leigumálið við 6.000 $m^2$ eystureftir, soleiðis at tað samlaða økið verður 10.000 $m^2$.

Eisini verður søkt um at leingja leigumálið til 25 ár.

Í umsóknini verður sagt, at umframt at brúka økið til móttøku og goymslu av sandi og skervi, sum verður innflutt um bryggjuna á Sundi, er ætlanin eisini at seta ein bygning á økið, til goymslu av sementi. Seinni er ætlanin at byggja eina sement silo, og økið verður deilt upp í krubbur, til goymslu av ymiskum sløgum av skervi og sandi.

**Tilmæli:**
Havnameistarin mælir til at gera ein 25 ára leigusáttmála við P/F Articon, sambært uppskoti til leigusáttmála j.nr.14/04598.

**Vinnunevndin 06. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og beina málið í býraðið umvegis fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við vinnunevndini og gera 25 ára leigusáttmála við P/f Articon sambært fyriliggjandi uppskoti.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Einmælt samtykt.

| | | |
|---|---|---|
| **Býráðsfundir**<br>30. oktober 2014 | Blað nr.: 11556 | |
| | Formansins merki: | |

# 217/14 Samlað útbjóðing av undirhondsboð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík og útstykking við Djúpagil í Hoyvík

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 25.06.2014 | 151/14 | 14/03366-96 |
| 2 Fíggjarnevnd | 03.07.2014 | 209/14 | 14/03366-96 |
| 3 Býráðsfundir | 03.07.2014 | 162/14 | 14/03366-96 |
| 4 Mentamálanevndin | 03.07.2014 | 160/14 | 14/03366-96 |
| 5 Mentamálanevndin | 20.10.2014 | 199/14 | 14/03366-96 |
| 6 Fíggjarnevnd | 22.10.2014 | 272/14 | 14/03366-96 |
| 7 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 217/14 | 14/03366-96 |
| 8 Fíggjarnevnd | 30.10.2014 | 286/14 | 14/03366-96 |

**Málslýsing:**
Umsitingin hevur, saman við HMP Consult arbeitt við gerð av nýggjum fótbóltsvølli í Hoyvík (sí j.nr. 14/000714 og 14/01462) og eisini eini útstykkingarætlan saman við LBF við Djúpagil (sí j.nr. 14/01452). Vegna væntandi stórt yvirskot av tilfari frá vøllinum og tilsvarnadi undirskot av tilfari til útstykkingina, varð samtykt (Tekniska nevnd 30. april 2014 og Fíggjarnevnd 01. maj 2014) at bjóða bæði prosjektini út saman sum undirhondsboð, við luttøku av J&K Petersen og Articon.

Undirhondsboðini skuldu vera kommununi í hendi seinast 3. juni 2014 kl 14.00.

Úrslitini vóru hesi:
J&K Petersen kr. 24.804.771
Articon kr. 27.886.745

Ráðgevarnir hava mett um undirhondsboðini (sí j.nr. 14/03366-53 og j.nr. 14/03366-52) og mælt til at taka av lægra undirhondsboðnum frá J&K Petersen.

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin og leiðarin á verkætlanardeildini mæla til at taka av tilboðnum frá J&K Petersen uppá útstykkingina Djúpagil og beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá J&K Petersen uppá fótbóltsvøllin í Hoyvík og at játta kr. 19.047.851 av íløgukontu 5775 Vøllur í Hoyvík til hesa verkætlanina umframt stuðul frá FSF kr. 0,9 mió. og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Tekniska nevnd 23. juni 2014:** Ein meiriluti, Elin Lindenskov, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson og Bogi Andreasen, samtykti at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið um fíggjarnevndina.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Mentamálanevndin 24. juni 2014:** Samtykt at heita á umsitingina um at samráðast við tilboðsgevaran um arbeiði fyri tøku upphæddina á íløguætlanini íroknað stuðulin frá FSF kr. 9.604.000,- og leggja fyri nevndina aftur.

**Fíggjarnevnd 24. juni 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið fyri læstum hurðum 25. juni 2014:** Kunnað var um málið.

**Mentamálanevndin 25. juni 2014:** Samtykt at taka undir við tilboðið uppá 9.477.594 kr., og í hesum sambandi at játta kr. 9.604.000 íroknað stuðul frá FSF av íløgukontu 5775 Vøllur í Hoyvík, harumframt at játta kr. 2.500.000 kr. til keyp av lendi, mvg og óvæntað av konto fyri keyp og sølu.

**Býráðsfundir 25. juni 2014:** Sjúrður Olsen luttók ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt við 11 atkøvðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Jógvan Arge, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurdsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Jákup Dam

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur greinað tilboðið hjá J&K Petersen nærri og mælir til nakrar broytingar, tó innanfyri somu tilboðsupphædd, sí j.nr.: 14/03366-107, soleiðis, at arbeiðið eftir at gera uppá sjálvan vøllin næsta ár í høvuðsheitum er ovastu løgini – asfalt og graslíkið.

Eisini hevur umsitingin greinað fíggjarkarmin betri í mun til mvg, eftirlit og kostnað fyri lendið, og at hesir postar skulu leggjast afturat samlaða kostnaðinum fyri vøllin. Í hesum sambandi verður eisini mett neyðugt at broyta samtyktina frá síðsta býráðsfundi um tær 2.500.000, játtaðar av kontu keyp og søla, bæði hvat endamálunum og upphæddini viðvíkja. Kostnaðurin fyri keyp av lendinum er kr. 3.310.136, og mett verður rættast, at kontan keyp og søla fíggjar alla hesa upphædd og ikki annað (munurin er kr. 810.136).

Írestandi fíggjartørvurin er tá kr. 1.081.850 at runda uppeftir, og sum mett verður eiga at verða játtaðar av íløgukarminum til ítrótt konta 5775.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og mentamálaleiðarin mæla til at taka av tilboðnum frá J&K Petersen à kr. 9.477.594, og heimilað umsitingini at samráðast um ítøkiligar postar í mun til at fáa sum mest av arbeiðinum gjørt upp til ovastu løgini av vøllinum. Mælt verður harumframt til at hækka áður samtyktu játtanina kr. 2.500.000 til keyp av lendinum til kr. 3.310.136 av kontu fyri keyp og sølu, og at játta írestandi fíggjartørvin kr. 1.100.000 av løgukarminum 5775 ætlað 50 svimjihyli, og at henda upphædd kemur á aftur íløgukarmin til 50 m svimjihylin fyri 2015.

**Mentamálanevndin 03. juli 2014:** Ein meiriluti, Tróndur Sigurðsson, Sigrun Mohr og Elin Lindenskov, tekur undir við tilmælinum og beinir málið í býráðið umvegis fíggjarnevndina.

Ein minniluti: Jógvan Arge og Bogi Andreasen, taka støðu á seinni fundi.

**Fíggjarnevnd 03. juli 2014:** Útsett.

**Býráðsfundir 03. juli 2014:** Útsett.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**

Viðv. fótbóltsvøllinum í Hoyvík:
Sambært kostnaðarmeting hjá teknisku fyrisitingini er samlaði kostnaðurin kr. 15.135.000. Av hesum eru áður játtaðar kr. 2.200.000. Harumframt hevur FSF játtað stuðul uppá kr. 900.000. Írestandi fíggingin er sostatt kr. 12.035.000.

Viðv. útstykkingini Oman Gil:
Sambært kostnaðarmeting hjá teknisku fyrisitingini verður samlaði kostnaðurin uml. kr. 13.500.000. Tað eru 24 grundstykkir og verður kostnaðurin upp til kr. 600.000 pr. liðugt planerað grundstykki.

Arbeiðið at gera útstykkingina verður fíggjað soleiðis, at grundstykkini verða seld áðrenn arbeiði byrjar, eigarafelag sett á stovn og eigararnir gjalda frammanundan aconto-gjøld til at fíggja verkætlanina.

**Tilmæli:**
Viðvíkjandi gerð av fótbóltsvølli í Hoyvík, mæla trivnaðarstjórin og tekniski stjórin til at taka av tillagaða tilboðnum frá J&K Petersen á kr. 10.161.663 og at heimila umsitingini at samráðast við og gera sáttmála við J&K Petersen um arbeiðið.

Eisini verður mælt til, at írestandi fíggingin verður fíggjað við kr. 7.425.000 av karminum til fótbóltsvøll í Hoyvík og kr. 4.610.000 av umraðfestingum.

Harumframt verður mælt til, at umsitingin skipar fyri einum kunningarfundi, har íbúgvar í ovaru síðu av Jørðundargøtu verða kallaðir inn og kunnaðir um ætlanina at gera fótbóltsvøll.

Viðvíkjandi útstykkingini Oman Gil, mæla tekniski stjórin og kommunustjórin til, at heimilað umsitingini at samráðast við og gera sáttmála við J&K Petersen um arbeiðið.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við tilmælinum og at beina málið í býráðið.

**Ískoyti:**
Umsitingin hevur gjørt notat í málið, sum er ein frásøgn frá ástaðarfundinum, sum var 21. oktober 2014. Notatið lýsir eisini hvat arbeiði manglar í fyri at fáa vøllin lidnan, soleiðis at spælast kann á vøllinum og eina kostnaðarmeting fyri at gera hetta arbeiðið.
Notatið, sum er j.nr. 14/03366-140, varð eisini lagt fram á fundinum í fíggjarnevndini 22. oktober 2014.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniskistjórin mæla til, at írestandi fíggingin verður fíggjað við kr. 7.425.000 av karminum til fótbóltsvøll í Hoyvík og 5 mió. kr. av judo og borðtennishøll L57023.

**Fíggjarnevnd 30. oktober 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Annfinn Brekkstein, Sjúrður Olsen og Tróndur Sigurðsson, mæla býráðnum til at taka undir við tilmælinum.

Jógvan Arge tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu:
Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Greiddi ikki atkvøðu.
Marin Katrina Frýdal.

# 218/14 Broyta fyrisitingarligar mannagongdir fyri bygginevndir

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 18.09.2014 | 179/14 | 14/04389-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.10.2014 | 281/14 | 14/04389-1 |
| 3 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 218/14 | 14/04389-1 |
| 4 Fíggjarnevnd | 30.10.2014 | 287/14 | 14/04389-1 |

## Málslýsing:

Borgarstjórin hevur fingið áheitan frá býráðslimum um at endurskoða mannagongdina fyri bygginevndir við tí fyri eygað, at broyta bygnaðin og fáa heimildir og ábyrgdarviðurskifti greiðari.

Heldur enn at hava politiska umboðan í bygginevndunum, eiga avvarðandi faknevndir at fáa ein størri leiklut í sambandi við verkætlanir, eins og heimildarbýtið – bæði millum politiska myndugleikan og fyrisiting og innanhýsis í fyrisitingini eigur at verða gjørt nógv greiðari.

Ætlanin er at hava uppskot til nýggja mannagongd klára til býráðsfundin í oktober 2014.

**Býráðið fyri læstum hurðum 18. september 2014:** Kunnað varð um málið.

**Ískoyti:**
Uppskot verður sent áðrenn fundin.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Framlagt.

**Ískoyti:**
Tilfar kemur til fundin.
**Fíggjarnevnd 30. oktober 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson samtyktu at taka undir við uppskotinum.

Jógvan Arge tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Útsett.

# 219/14 Arbeiðseftirlitið : Eftirlitsvitjan á Dagstovninum Birkilund um inniklima, møguliga er blámusoppur í bygninginum matr. nr. 727et, Tórshavn (2012-0493)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 219/14 | 14/02485-33 |

**Málslýsing:**
Í sambandi við eftirlitsvitjan á Dagstovninum Birkilund hevur Arbeiðseftirlitið tikið loftsplátu til nærri kanningar. Kanningarúrslitið gevur ábendingar um, at bygningurin kann vera fongdur við blámusoppi. Eftirlitsvitjanin staðfesti fleiri lekar undir loftinum í bygninginum, og at blettir eru á fleiri loftsplátum. Arbeiðseftirlitið hevur í skrivi givið kommununi boð um at seta í verk støðukanning av fukti og blámusoppi í bygingingum.

Kommunan hevur biðið HMP Consult gera hesa kanning, sum væntandi bera okkum úrslitið um tríggjar vikur.

Fyri tíð síðan, tá ítøkiliga varð arbeitt við at stovnurin skuldi gerast kommunalur, varð gjørd ein støðulýsing til tess at staðfesta, hvørjum standi bygningurin var í. Heitt varð á HMP Consult at gera støðulýsingina, sum varð liðug í mars 2009. Sum avtalað hevur HMP Conslut raðfest og staðfest hvørjar ábøtur vóru átroðkandi, minni átroðkandi og ábøtur, sum mælt varð til blivu gjørdar. Hesar raðfestingar vóru kostnaðarmettar, og sum sæst niðanfyri eiga munandi ábøtur at verða gjørdar á bygningin.

Fyrsta raðfesting inniheldur í høvuðsheitum at skifta takið og alt sum har til hoyrir, eisini loftsklæðingin innanfyri. Eisini eru ábøtur á ventilatiónina við í hesum. Raðfesting 2 inniheldur útvendiga bjálving og klæðing av betongveggunum, og raðfesting 3 er millum annað at skifta hvítvørur og gera aðrar ábøtur á m.a. gólvini.

Niðanfyri er ein uppseting út frá støðulýsingini og tí, sum mett er kemur afturat.

| | |
|---|---|
| Raðfesting 1 | kr 4.683.882 |
| Raðfesting 2 | kr 445.000 |
| Raðfesting 3 | kr 475.000 |
| Samlað | kr 5.603.882 |

Hesi tøl eru uttan ókent, uttan mvg, uttan ráðgeving og eftirlit, uttan prístalsviðgerð og projektumsiting.

Verður Birkilund samanborin við Dagstovnin í Hoyvík, eru ávís viðurskifti, ið ganga aftur. Báðir stovnarnir eru tiknir í brúk í 1983 sum sjálvsognarstovnar, báðir hava havt lekar frá takinum í fleiri ár, betongútveggir eru partvís í báðir bygningunum.

Brúka vit eina samlaða kostnaðarmeting við støði í støðulýsingini frá 2009, kann hetta roknistykkið setast upp:

| | |
|---|---|
| Samlað kostnaðarmeting | kr. 5.603.882 |
| Ókent 30% | kr. 1.681.164 |

| | |
|---|---|
| Prístalsviðgerð | kr. 200.000 |
| Samlað | kr. 7.484.046 |
| | |
| Ráðgevara útreiðslur 12% | kr. 898.085 |
| Projektumsiting hjá TK | kr 200.000 |
| Samlað uttan mvg | kr 8.582.131 |
| Samlað við 6,25% mvg (536.383) | **kr 9.118.514** |

**Mentamálanevndin 14. mars 2012:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri, kunnaði um málið.

**Fíggjarnevndin 21. mars 2012:** Jóan Petur Hentze, trivnaðarstjóri kunnaði um málið.

**Ískoyti:**
HMP Consult hevur latið kommununi omanfyri nevndu kanning við fleiri tilmælum, sum kommunan síðani hevur virkað eftir. Bráðfeingistilmæli var at tetta allar lekar í tekjuni og við vindeygabond v.m., og at gera eina høvuðsreingerð at fáa sonevndu MM-tølini niður á nøktandi støði. Harumframt at fáa luftskifti at virka optimalt. Eisini var rátt frá at nýta 3 høli.

Hetta eru tó at meta sum fyribils átøk, og sum lýst omanfyri er neyðugt við umfevnandi høvuðsumvæling. Í hesum sambandi hevur umsitingin mett rættast at steingja bygningin í summar, og at børnini fáa dagstovnapláss í øðrum hølum.

Eftir umbøn hevur HMP Consult gjørt kostnaðarmeting fyri høvuðsumvæling. Sum alternativ til hetta er eisini gjørd kostnaðarmeting av at taka bygningin niður og byggja nýggjan stovn í somu støđd.

Høvuðsumvæling av verandi bygningi, við nýggjari tekju, nýggjum klædningi og nýggju tekniskum installatiónum íroknað kravdar dagføringar í m.a. neyðhurðar og rýmingarleiðir er mett til kr. 20-21 mió v/mvg.

Ein niðurtøka og burturbeingin av verandi bygningi, byggja nýggjan bygning í somu støđd og nýgerð av uttanumøki er mett at kosta kr. 33-34 mió v/mvg. Tá er roknað við einum miðal fermetraprísi á kr. 20.000.

Hóast broytingar í barnatalinum, er tørvur á júst hesum stovninum. Hann er millum størstu stovnar í kommununi, og harumframt er hann einasti stovnur aftrat Lítlaskógi, sum serliga hevur eysturbýin sum upptøkuøki.

Ein høvuðsumvæling við nøkrum dagføringum av eitt nú brunaviðurskiftum, konstruktiónstrupulleikum og líknandi er fyribils mett til kr. 20-21 mió v/mvg. Ein høvuðsumvæling vil tó ikki loysa uppá fleiri minni heppin viðurskifti viðvikjandi funktiónum, hvussu góður bygningurin er fyri rørslutarnað, orkunýtslu o.ø.

Ein nýbygging er dýrari, men tá fæst ein stovnur, sum lýkur øll nútíðar krøv, eins og tað eisini gevur møguleika fyri at skipa bygningin á grundini øðrvísi, soleiðis at betri umstøður fáast á útiøkinum.

Neyðugt er tí við prinsippavgerð um, hvørt bygningurin skal høvuðsumvælast ella takast niður og nýggjur byggjast upp í staðin á sama stað. Tað er lítil ivi um, at besta framtíðartryggjaða loysnin bæði í mun til kostnað og funktiónir er at taka bygningin niður og byggja nýggjan stovn, sum er normeraður til nakað sama tal av børnum.

Neyðugt er eisini at gera ætlan fyri, hvussu arbeiðið skal raðfestast í mun til íløguætlanina í øllum førum frá 2013. Eingin íløgujáttan er tøk á grein 3 Børn og ung.

Í mun til at seta fígging av til at fyrireika eina verkætlan, hvørt tað so er høvuðsumvæling ella nýbygging, so kann játtast fáast til vega frá sparingini í sambandi við pedagogverkfallið konta 3215 Aðrar útreiðslur. Har eru kr. 3.673.085 tøkar.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin, leiðarin á barna- og ungdómsdeildini og leiðarin á húsaumsitingini mæla til at taka burtur verandi bygning og byggja nýggjan bygning til dagstovnin Birkilund á sama grundøki. Harumframt verður mælt til at játta kr. 3 mió av kontu 3215 Aðrar útreiðslur til at fyrireika byggiverkætlan, og at sett verður bygginevnd.

**Mentamálanevndin 16. mai 2012:** Leiðarin á húsaumsitingini kunnaði um málið. Samtykt at biðja umsitingina um eina gjølla fakliga frágreiðing um støðuna á stovninum til næsta fund.

- Frágreiðing løgd fram.

**Mentamálanevndin 13. juni 2012:** Nevndin samtykti at mæla til at taka burtur verandi bygning og byggja nýggjan bygning til dagstovnin Birkilund á sama grundøki. Harumframt mælir nevndin til at játta kr. 3 mió av kontu 3215 Aðrar útreiðslur til at fyrireika byggiverkætlan, at sett verður bygginevnd og at avseta pening til byggingina á fíggjarætlanini 2013 og 2014 og beinir málið í býráðið um fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin 20. juni 2012:** Samtykt at mæla býráðnum til at taka undir við mentamálanevndini.

**Býráðið 28. juni 2012:** Einmælt samtykt.

**Býráðið 26. juli 2012:** Einmælt samtykt.

**Trivnaðarnevndin 7. april 2014:** Samtykt at seta í verk býráðssamtyktina frá 26. juli 2012, at bjóða arkitektauppávuna út alment, at játta tøku upphæddina á íløguætlanini til endamálið og beina málið um fíggjarnevndina í býráðið.

**Fíggjarnevnd 19. maj 2014:** Samtykt at mæla býráðnum til at bjóða arbeiðið at høvuðsumvæla bygningin út sum undirhondsboð millum tveir arbeiðstakarar.

**Býráðsfundir 22. mai 2014:** Samtykt við 12 atkvøðum fyri og ongari ímóti at taka undir við fíggjarnevndini.

Fyri atkvøddu: Jógvan Arge, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein, Jákup Dam, Bjørghild Djurhuus, Elin Lindenskov, Sjúrður Olsen, Rúni Djurhuus og Heðin Mortensen

Greiddi ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal.

**Ískoyti:**
Víst verður til býráðssamtykt 22. mai 2014 um at bjóða út arbeiðið at høvuðsumvæla dagstovnin Birkilund. Arbeiðið varð boðið út til tveir 2 arbeiðstakarar og eitt tilboð kom inn, tað er frá Húsavarðatænastuni.

Tilboðið er eftirkannað. Mett verður, at soppatrupulleikarnir verða loystir, men eisini, at allar neyðugar veitingar eru ikki við í tilboðnum, og at týðandi dagføringar eru heldur ikki fevndar av tilboðnum. Við støði í innkomna tilboðnum, eftirkanningini av tilboðnum og seinni samráðing við tilboðsveitaran, verður nú dagført tilboð latið kommununi fyri umvælingarætlanina, sum í størri mun tryggjar, at allar veitingar eru við, og at umvælingin verður nøktandi og uppfyllir tey krøv, ið sett verða í dag, eisini í mun til orkunýtslu.

Ætlanin er at hava eina nýggja dagførda kostnaðarmeting og eina dagførda tíðarætlan klárt til fundin.

**Ískoyti (nr. 2):**
Umsitingin hevur fingið tilboðið frá Húsavarðatænastuni. Tilboðið er eftirhugt og dagført, soleiðis at allar veitingar eru við, samstundis sum stovnurin verður umvældur soleiðis, at atlit verða tikin til tey krøv, sum í dag verða sett til bjálving, el, ventilatión osv.

Tilboðið frá Húsavarðatænastuni    kr. 14.481.000 uttan mvg

<u>Arbeiðið umfatar í stuttum:</u>

- Øll takkonstruktiónin, uttan sperrur, verður skift út
- Útveggir verða gjørdir av nýggjum, alt uttan stórviður
- Øll vindeygu og allar úthurðar verða nýggjar, út træ/alu
- Útveggir og tak verður bjálvað 50 mm meira enn í dag.
- Útveggur í kjallaranum verður bjálvaður uttan og pussaður
- Allir skilaveggir verða klæddir við gips
- Verandi linolium á gólvunum verður skift út við nýtt
- Allir listar verða útskiftir
- Bygningurin verður málaður uttan og innan, alt íroknað
- El-arbeiði verður gjørt soleiðis at SEV kann góðkenna bygningin eftir dagsins reglum
- Nakað av sanitet og hitainnlegging
- Nýtt ventilatiónsanlegg verður sett upp á ovaru hædd (nøkur smá anlegg)
- CTS stýring verður sett up
- Lendisarbeiði fram við bygninginum.

At rudda bygningin og at seta verandi innbúgv inn í bygningin aftur er ikki við í tilboðnum.

<u>Tíðarætlan:</u>
Arbeiðið er mett at taka 10 mánaðir. Um arbeiðið kann byrja beinanvegin, so kann alt arbeiðið verða liðugt til 1. august 2015.

Á íløguætlanini eru kr. 8,5 mió tøkar til Birkilund

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin, tekniski stjórin og leiðarin á barna- og ungdómsdeildini mæla til at taka av tilboðnum frá Húsavarðatænastuni soleiðis, at kommunan ger sáttmála fyri arbeiðið upp til kr. 14,5 mió.

**Mentamálanevndin 8. oktober 2014**: Samtykt at taka undir við tilmælinum og játta írestandi fíggjartørvin við umraðfesting av íløgum at taka upp á eykafundi.

**Mentamálanevndin 20. oktober 2014:** Samtykt at játta írestandi fíggingina av íløgukarminum 2015.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Samtykt at taka undir við mentamálanevndini og beina málið í býráðið.

**Tilmæli:**
Trivnaðarstjórin og tekniski stjórin mæla til at umraðfesta íløgur soleiðis, at játta 5,5 mió. kr. av konto 7175 framfluttur íløgukarmur tyrvingarpláss til dagstovnin Birkilund L31004

**Fíggjarnevnd 30. oktober 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Sjúrður Olsen, Annfinn Brekkstein, Tróndur Sigurðsson samtyktu at taka undir við tilmælinum.

Jógvan Arge tekur støðu á býráðsfundinum.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Atkvøtt varð um tilmæli, ið varð samtykt við 12 atkvøðum fyri og einari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Ímóti atkvøddi: Marin Katrina Frýdal.

Marin Katrina Frýdal tekur ikki undir við tilmælinum, og vísir til samtyktina í trivnaðarnevndini 7. apríl 2014, at byggja ein nýggjan dagstovn, tí royndirnar vísa, at kostnaðarmeting ongantíð heldur við slíkum høvuðsumvælingum.

## 220/14 Val av kommunustýrisumboðum í skúlastýrini (2012-2883)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 220/14 | 14/03450-18 |

**Málslýsing:**
Sambært §50 í løgtingslóg nr.125 frá 20. juni 1997 um fólkaskúlan, sum seinast er broytt við løgtingslóg nr.64 frá 7.juni 2007, skal kommunustýri velja umboð í skúlastýrini.

2 kommunustýrisumboð skulu veljast í hvørt stýri, men tá færri enn 20 næmingar eru í einum skúla, skal 1 kommunustýrisumboð veljast. Valskeiðið hjá kommunuumboðunum er valskeiðið hjá kommunustýrinum.

Í Tórshavnar kommunu eru 11 fólkaskúlar. Skúlarnir eru hesir: Skúlin á Argjahamri, Venjingarskúlin, Tórshavnar Kommunuskúli, Sankta Frans skúli, Eysturskúlin, Hoyvíkar skúli, Skúlin við Løgmannabreyt, Kollafjarðar skúli, Kaldbaks skúli, Velbastaðar skúli og Nólsoyar skúli.

**Býráðið 29. november 2012:** Vald vórðu:
**Kommunuskúlin:**
*Fastir limir:* — *Tiltakslimir:*
Helena Dam á Neystabø — Elin Lindenskov
Sjúrður Olsen — Bogi Andreasen

**Venjingarskúlin:**
*Fastir limir:* — *Tiltakslimir:*
Halla Samuelsen — Tróndur Sigurdsson
Bogi Andreasen — Sjúrður Olsen

**Eysturskúlin:**
*Fastir limir:* — *Tiltakslimir:*
Tróndur Sigurdsson — Sigrún Mohr
Jákup Dam — Marin Katrina Frýdal

**Sankta Frans skúli:**
*Fastir limir:* — *Tiltakslimir:*
Bjørhild Djurhuus — Helena D. Á Neystabø
Bogi Andreasen — Sjúrður Olsen

**Skúlin á Argjahamri:**
*Fastir limir:* — *Tiltakslimir:*
Helena D. Á Neystabø — Halla Samuelsen
Sjúrður Olsen — Bogi Andreasen

**Hoyvíkar skúli:**
*Fastir limir:* — *Tiltakslimir:*
Bjørghild Djurhuus — Tróndur Sigurdsson
Jógvan Arge — Jákup Dam

**Kollfjarðar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Sigrún Mohr | Elin Lindenskov |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |

**Kaldbaks skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Halla Samuelsen | Sigrún Mohr |
| Jógvan Arge | Jákup Dam |

**Nólsoyar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Elin Lindenskov | Sigrún Mohr |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |

**Velbastaðar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Elin Lindenskov | Bjørghild Djurhuus |
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |

**Skúlin við Løgmannabreyt**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Tróndur Sigurdsson | Halla Samuelsen |
| Marin Katrina Frýdal | Jógvan Arge |

**Býráðið 24. januar 2013:** Einmælt samtykt hesar broytingar:

**Kommunuskúlin:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Halla Samuelsen | Sigrún Mohr |
| Helena Dam á Neystabø | Elin Lindenskov |

**Kaldbaks skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastir limir:* | *Tiltakslimir:* |
| Sjúrður Olsen | Bogi Andreasen |
| Jógvan Arge | Jákup Dam |

**Býráðið fyri læstum hurðum 12. desember 2013:** Umrøtt.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Valdir vórðu:

**Nólsoyar skúli:**

| | |
|---|---|
| *Fastur limur:* | *Tiltakslimur* |
| Annfinn Brekkstein | Sjúrður Olsen |

# 221/14 Staðseting av Tjóðpalli (Tjóðleikhús)

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Byggi- og býarskipanarnevndin | 10.10.2014 | 40/14 | 14/04686-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 22.10.2014 | 270/14 | 14/04686-1 |
| 3 Byggi- og býarskipanarnevndin | | | 14/04686-1 |
| 4 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 221/14 | 14/04686-1 |

**Lýsing av málinum - samandráttur:**
Í sambandi við at mentamálaráðið (landið) hava ætlanir um at byggja nýggjan tjóðpall (tjóðleikhús), skal avgerð takast um staðseting.

Í 2013 var ein arbeiðsbólkur settur at gera eina byggiskrá, Tórshavnar kommuna er umboðað í bólkinum við trivnaðarstjóranum, og er bólkurin m.a. komin fram til, at bygningurin skal verða uml. 3.000 m² til víddar.

Mentamálaráðið hevur heitt á Tórshavnar kommunu um at ávísa eina staðseting, har nýggi Tjóðpallurin kann byggjast.

Tosað hevur verið um tvær møguligar staðsetingar, hesar eru:

1. Á økinum, har Tórshavnar kommunuskúli stendur.
2. Á Skálatrøð, har tað stóra parkeringsplássið er.

Arkitektarnir Zeta hava gjørt nakað av tilfari, sum vísir báðar omanfyri nevndu staðsetingarnar.

**Skjøl:**
Skjøl sum eru tøk í sambandi við viðgerðina av málinum:
- *Tilfar frá Zeta um staðseting við Kommunuskúlan, mál.nr. 2014-0000/1*
- *Tilfar frá Zeta um staðseting við Skálatrøð, mál.nr. 2014-0000/2*

**Tilmæli:**
Tekniski stjórin mælir til, at umsitingin, saman við Zeta-arkitektum, ger eitt uppskot at leggja fyri nevndina aftur, har nýggjur Tjóðpallur verður staðsettur á Skálatrøð, saman við øðrum hóskandi virksemi og parkeringshúsi. Eisini verður mælt til at játta upp til kr. 200.000, av íløguætlan fyri miðbýin kt. 6275, til arbeiðið.

**Byggi- og býarskipanarnevndin 10. oktober 2014:** Samtykt at umsitingin, saman við Zeta-arkitektum, ger eitt uppskot at leggja fyri nevndina aftur, har nýggjur Tjóðpallur verður staðsettur á Skálatrøð, saman við møguligum øðrum virksemi og møguligum parkeringshúsi. Eisini verður mælt til at játta upp til kr. 200.000, av íløguætlan fyri mðbýin kt. 6275, til arbeiðið og at beina málið í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevnd 22. oktober 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Jógvan Arge og Sjúrður Olsen, **s**amtykkir at taka undir við byggi- og býarskipanarnevndini, at Tjóðpallur verður

staðsettur á Skálatrøð við parkeringsmøguleikum, og at játta kr. 200.000 av íløguætlan fyri miðbýin konto 6275.

Ein minniluti, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein, tekur undir við tilmælinum hjá byggi- og býarskipanarnevndini.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Atkvøtt varð um meirilutatilmæli í fíggjarnevndini, ið varð samtykt við 10 atkvøðum fyri og ongari ímóti

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Elin Lindenskov, Bjørghild Djurhuus, Sigrún Mohr, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Sjúrður Olsen, Marin Katrina Frýdal, Jákup Dam og Jógvan Arge.

Greiddu ikki atkvøðu: Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson og Annfinn Brekkstein,

# 222/14 Endurskoða lønir hjá varaborgarstjórum

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. | Journalnr. |
|---|---|---|---|
| 1 Býráðsfundir | 18.09.2014 | 183/14 | 14/04437-1 |
| 2 Fíggjarnevnd | 18.09.2014 | 255/14 | 14/04437-1 |
| 3 Býráðsfundir | 30.10.2014 | 222/14 | 14/04437-1 |

## Málslýsing:

Fíggjarnevndin verður biðin um at taka støðu til, um broyting skal verða gjørd í kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu v.v. løninum hjá varaborgarstjórunum, nú kunngerðin um samsýningar o.a. sambært kommunustýrislógini er broytt.

Í § 11, stk. 2 stendur at, samsýningin til varaborgarstjórar sambært stk. 1 í mesta lagi kann verða 10 % av samsýningini , ið verður givin borgarstjóranum sambært § 10

**Í Kommunustýrisskipanini fyri Tórshavnar kommunu § 37, 9. petti stendur:** ***1. Varaborgarstjóri fær eina árliga samsýning uppá 10% av samsýningini, ið verður givin borgarstjóranum, jfr. § 10, stk 2 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.***

**Fíggjarnevnd 18. september 2014:** Ein meiriluti, Heðin Mortensen, Tróndur Sigurðsson, Sjúrður Olsen og Annfinn Brekkstein mælir býráðnum til at gera soljóðandi broyting í § 37, 9. petti:

1. og 2. varaborgarstjóri fáa hvør sær eina árliga samsýning upp á 5 % av samsýningini, ið verður givin borgarstjóranum, jfr. § 10, stk. 2 í kunngerð um samsýning v.m. sambært kommunustýrislógini.

Ein minniluti, Marin Katrina Frýdal, tekur støðu á seinni fundi.

**Býráðsfundir 18. september 2014:** Samtykt við 8 atkvøðum fyri at taka undir við uppskotinum til broyting av kommunustýrisskipanini.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Bogi Andreasen, Annfinn Brekkstein og Sjúrður Olsen.

Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam greiddu ikki atkvøðu.

Jógvan Arge og Elin Lindenskov luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

**Býráðsfundir 30. oktober 2014:** Jógvan Arge og Elin Lindenskov luttóku ikki í viðgerðini av málinum.

Samtykt við 9 atkvøðum fyri og ongari ímóti.

Fyri atkvøddu: Heðin Mortensen, Bjørghild Djurhuus, Helena Dam á Neystabø, Sigrún Mohr, Tróndur Sigurðsson, Halla Samuelsen, Annfinn Brekkstein, Bogi Andreasen og Sjúrður Olsen.

Greiddu ikki atkvøðu: Marin Katrina Frýdal og Jákup Dam.

**FUNDURIN LOKIN KL. 21:45**

**GERÐABÓKIN GÓÐKEND:**

| | | |
|---|---|---|
| Heðin Mortensen | Jógvan Arge | Helena Dam á Neystabø |
| Tróndur Sigurðsson | Halla Samuelsen | Bogi Andreasen |
| Annfinn Brekkstein | Jákup Dam | Marin Katrina Ragnarsdóttir Frýdal |
| Bjørghild Djurhuus | Elin Lindenskov | Sjúrður Johan Olsen |
| | Sigrún Amalia Mohr | |